# Vørumessa – FTZ Tórshavn

Vegna vørumessu steingir deildin í Havn fríggjadagin 28. august kl. 12.00.
Opið er aftur leygardagin frá kl. 10.00 – 14.00 við fleiri sera góðum tilboðum.



**JO-EL káputrumla**

25 m káputrumla við 3 x 1,5 neprenkápli við jørð. 4 stikk.

einans **kr. 375,-**

**Bori-/skrúvumaskina**

Makita 10,8 V bori-/skrúvumaskina. 18 momenttrin + motorbremsu. Verður latin við 2 stk. 1,3 Ah Li-Ion battarium, 50-min. løðara, beltihaldara og lykt.




einans **kr. 1375,-**



einans **kr. 4370,-**

**Verkstaðsvognur**

Sealey verkstaðsvognur við 4 skuffum og 105 lutum/amboðum. Framleiddur úr sterkum plátum við gummiverju á kantum. Hjól kunnu lasast.

**GEVIÐ GÆTUR! Deildin á Kambsdali er stongd fríggjadagin 28. og leygardagin 29. august**

## Nýggj telefonnummur:

**Tórshavn:............. 355680**
**Kambsdalur:......... 475690**

*FTZ-billutir og amboð í Havn og á Kambsdali*

FTZ BILLUTIR & AMBOÐ P/F

Fútalág 1B · Postboks 3061 · FO-110 Tórshavn · Tel 355680
Kambsenni 5 · FO-530 Fuglafjørður · Tel 475690





sansir.fo

Leiðari til Tryggingardeildina hjá ALS

# Eitt nýtt stig á starvsleiðini

Ert tú tann føddi leiðarin, sum dugir at fáa fólk at arbeiða væl saman? Dugir tú at fáa fólk at skapa úrslit? So er eitt spennandi starv sum leiðari á Tryggingardeildini leyst at søkja.

Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, flyting millum A-kassar, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina.

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum verður at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini. Saman við stjóranum og deildarleiðaranum á Ávísingardeildini og Fíggjar- & Fyrisitingardeildini myndar deildarleiðarin á Tryggingardeildini leiðsluna á ALS.

Leiðarin á Tryggingardeildini umboðar ALS í norðurlendskum samstarvi, og tí skalt tú rokna við nakað av ferðing.

Starvið er fjølbroytt við nógvum avbjóðingum, og tí krevst, at deildarleiðarin hevur hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir. Fyrimunur er, um deildarleiðarin er útbúgvin løgfrøðingur, hevur góðan kunnleika til føroyska arbeiðsmarknaðin og innlit í samfelagsviðurskifti annars.

Vit leggja dent á tíni leiðara- og samstarvsevni. Tú hevur evnini at stíla fyri og samskipa. Tú varðveitir yvirlitið, hóast nógv hendir samstundis, samskifti er tín sterka síða, og tú dugir væl at stuðla og motivera.

Lønin verður sambært avtalu, og starvið verður sett skjótast til ber. Síðsta freist at søkja starvið er tann 14. sept. 2009 kl. 12.00.

Umsóknir skulu stílast til Ernst Jacobsen, stjóra á ALS, sum fegin sigur tær meira um starvið á telefon 34 95 50 ella teldupost ernst@als.fo.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 16 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo